# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein býur – kommuna – í menning

Tað skerst ikki burt, at Tórshavn er ein kommuna í sera sterkari menning. Býurin veksur við rúkandi ferð, og hóast ferðin kann vera eitt sindur ørkymlandi, má ásannanst, at góð javnvág er í útbyggingini. Um vikuskiftið vórðu nýggjur skúli og nýggj ítróttarhøll og læknamiðstøð alment tikin í nýtslu í Kollafirði. Øll orsøk er at fegnast um hesa hending og orsøk er at ynskja ikki bert kollfirðingum men øllum borgarum tillukku. Skal ein samanlegging av bygdum í størri eindir eydnast og vinna undirtøku, so er umráðandi, at javnvág er millum allar geografiskar partar í kommununi.

Nýggjur skúli og nýggj ítróttarhøll fara at bøta heilt munandi um trivnaðin í økinum. Trupulleikar hava verið av skúlabygginini, men hesir eru nú av, og øll kunnu nú fegnast, um at børn og lærarar hava fingið tær bestu umstøður. Skúlin er støðið undir øllum framburði, og í hesum høpi hava góð hølir nógv at siga. Tað er eisini sera týdingarmikið, at tey ungu hava góðar ítróttarhentleikar. Alt, sum stuðlar upp undir gott og sunnt frítíðarvirksemi er av tí góða. Tað er umráðandi, at tey ungu hava góð alternativ til bilarnar og gøturnar. Tað er hartil sera umráðandi, at borgarunum standa góð mentanartilboð í boði. Í hesum høpi skal býráðsformaðurin hava rós fyri ætlan sína at keypa Skeivapakkhús. Hetta hús er, sum hann sjálvur sigur, ein perla og kann mynda karmin um spennandi virksemi sum framsýningar bæði varandi og tíðaravmarkaðar. Eitt, sum er heilt upplagt, er at leggja Tórshavnar býarsavn í Skeivapakkhús og annars so sær Miðlahúsið bert fyrimunir í at fáa kapping sum mentanarhús frá eitt nú einum Skeivapakkhúsi. Húsini skulu sjálvsagt samstarva og kappast um at geva føroyingum tey bestu tilboð. Hinvegin fer Miðlahúsið sum partur av hesum umhvørvinum í framtíðini at leggja sera stóran dent á upplýsandi og kjakfremjandi tiltøk. Tað er umráðandi, at alment og privat ganga hond í hond fyri at menna alt hetta spennandi økið, Vágsbotnur, Bryggjubakki og umhvørvið framvið Tórsgøtu kunnu gerast ein framtíðar katalysatorur og magnetur fyri miðbýin.

So langt so gott kann ein siga um Tórshavnar kommunu. Tað tykist, sum tað er ein sera sterkur vilji til at veita borgarunum ta bestu tænastu á øllum økjum. Hinvegin kann ein sakna eina heildarætlan fyri alt tað mestsum rastleysa virksemi, sum eyðkennir politikkin hjá býráðsmeirilutanum. Hvørjar yvirskipaðar ætlanir eru á øllum økjum – vinnu, mentan. Hvussu verður raðfest og nær verða raðfestigarnar settar í verk? Her sakna vit ein dialog millum býráð og borgarar, men hann kann kanska koma enn. Tá hetta er sagt, má ásannast, at her hendir nógv gott og spennandi. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## Tann óunniligi sannleikin

**HØGNI HOYDAL**



John Johannesen, tingmaður, hevur tikið mær tað illa upp, at eg havi víst á tær ókeypis markeringarnar og hykklið, ið mynda føroyskan politikk í løtuni. Hann hevur tí skrivað eina almenna grein um undirritaða og Tjóðveldisflokkin. Tað skuldi hann ikki havt gjørt, tí hon er sera avdúkandi – fyri avsendaran.

Hóast eg bert havi staðfest politiskar veruleikar, ið eru alment kendir, so svarar hann aftur við einum rasandi persónligum álopi á undirritaða og Tjóðveldisflokkin. Tað eru vit so von við. Ikki gongur dagur í tinginum, har vit vísa á uppskot ella finnast at førda politikkinum, uttan at tað elvir til útspillingar av Tjóðveldisflokkinum. Um hvat, hann hevur gjørt ella ikki gjørt seinastu 60 árini. Hesar bíligi undanførslur kunnu sjálvsagt allir politikarar føra fram móti hvørjum øðrum ad finitum – í tað óendaliga. Tað er ongin kunstur, men tað tænir ongum endamáli uttan at kasta ábyrgd frá sær og skúgva alla sakliga viðgerð til viks. At yngsti politikarin á løgtingi fer í hetta sama kórið, sum eitt nú Hendrik Old og Marjus Dam syngja í hvønn tingdag, er sjálvsagt eitt ómetaligt vónbrot fyri okkum.

Men vit raka ikki veruliga botn, fyrr enn politikarar byrja at sleingja ósannindi og fordómar eftir hvørjum øðrum, tá teir eru kroystir. Tað ringasta er, at hesin framferðarháttur verður brúktur eins og í skúlagarðinum. Kennir onkur seg kroystan í sínum egna flokki og hevur fingið ilt í sínar floks- og samgongufelagar, so kann hann altíð leypa á tann, sum leiðararnir eru samdir um at happa. Tá fær hann aftur herðaklapp frá leiðarunum í skúlagarðinum og sleppur kanska aftur upp í part fyri eina tíð.

Greinin hjá John Johannesen er tíverri enn eitt talandi dømi um hetta. Hon er bygd á ósannindi í øllum lutum. Hann afturvísir ongum av teimum atfinningum, ið undirritaði hevur ført fram, men velur skúlagarðsloysnina:

John Johannesen heldur uppá, at undirritaði skal hava givið honum ábyrgdina fyri at 34.452 sivilfólk eru dripin í Irak. Tað er ósatt, sum ein og hvør kann kunna seg um við at lesa mína grein.

Hann sleingir út, at Tjóðveldisflokkurin skal hava góðtikið flúgving í føroyskum loftrúmi í sambandi við "eitt náðileyst álop á Irak" í oktober 2002. Hetta er ósatt. Tjóðveldisflokkurin hevur ongantíð tikið undir við at geva loyvi til henda flutning. Annars byrjaði Irak-kríggið ikki fyrr enn í mars 2003 – og áðrenn tað hevði Tjóðveldisflokkurin tikið stig til eina løgtingssamtykt ímóti Irak-krígnum, sum eisini javnaðarflokkurin tok undir við.

Hann leggur undirritaða undir sum landsstýrismaður at hava verið uppi í avgerðum um loyvi til flutning í føroyskum loftrúmi. Sigur enntá, at undirritaði skal hava "sitið við endan". Tað eru rein ósannindi. Tað eru bert løgmaður og uttanlandsnevnd, ið viðgera slíkar spurningar. Og øll ráðførsla er í trúnaði teirra millum. Men sjálvandi – tað er jú léttari at leypa á undirritaða enn á sínar egnu samgongufelagar. Við hesum logikki kundi Tjóðveldisflokkurin brúkt orkuna uppá at spilt Bjørn Kalsø út fyri trúnaðarráðførslur hjá løgmanni í dag.

At enda leggur John Johannesen undirritaða undir ikki at vilja samstarva á vinstraveinginum, og leggur Tjóðveldisflokkin undir at "kasta saman við teimum borgarligu"(!). Hetta lati eg standa eina løtu, meðan vit hugsa um, hvør situr í samgongu løtuni og tann politikk, ið verður førdur.

## Hysteriskt!!

**VICTOR CARLSEN**



Nú um dagarnar hoyrist, at Heilsufrøðisliga Starvsstovan tann 1. apríl í ár ætlar at taka plastleiku av handilshillunum, tí hesi leiku innihalda skaðiliga evnið "phalat", sum skal vera krabbameinselvandi, og kann harvið skaða smærri børn, sum bíta í ella súgva hesi leiku.

Tað er ivaleyst í lagi við hesi ávaring og handling, men nú fara eg og ivaleyst mong onnur við mær at bíða eftir, nær Heilsufrøðisliga Starvsstovan fer at tøma handilshillarnir fyri tubbaksvørur. Tað eru øll prógv og innihaldslýsingar, og ikki minst álvarsligu ávaringar, ið siga frá, at tubbakk er drepandi og elvir til krabbameins- og aðrar ræðuligar fylgisjúkur. Í tubbakki eru 4.000 skaðilig evni, so her er nógv at fara eftir. Í plastleikunum er bara eitt skaðiligt evni!

Eg haldi, at nú má hesin fullkomni heilsuørskapurin steðga, tí tað er so ótrúliga lætt at fara inni í leikuhandlarnar og har tøma hillarnar fyri leiku, tí børnini mótmæla ikki, men fara hesir úrmælingar á heilsuøkinum inn í kioskir og handlar at tøma hillarnar fyri tubbaksvørur, so kemur róp í, verið vís í tí. Vørurnar eiga at verða tiknar av hillunum, skal parolan um heilsuskaðilig evni haldast. Øll evni eru væl líka fyri lógini, ella hvussu?

Til samanberingar kann sigast, at hagtøl vísa, at tað doyggja uml. 80 - 100 føroyingar árliga av tubbaksrealteraðum sjúkum, men veit Heilsufrøðiliga Starvsstovan, ella sjúkrahúsverkið í Føroyum nakað um deyðsfall ella sjúkur, orsakað av evninum "phalat" í plastleikum?

Forrestin, so bíði eg eisini eftir, at løgtingsmaðurin, sum herfyri rópti "hysteriskt" um alment roykibann, at hann eisini fer at tosa og skriva um hysterí, har tað veruliga er talan um hysterí. Enn hoyrist einki, ið hvussu so er.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.